# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## MBF 25 ár í dag

Í dag sjálvan ST dagin verður Meginfelag Teirra Brekaðu, MBF, 25 ár, og dagurin verður, sum vera man hátíðarhildin. MBF hevur veruliga orsøk til at hátíðarhalda dagin, tí MBF hevur havt ómetaliga stóran týdning í føroyska samfelagnum. Um árskiftið í fjør settu lesarar okkara jaligt fokus á MBF við at kjósa forkvinnuna í MBF til ársins kvinnu. MBF er eitt meginfelag, ið fevnir um 25 limafelag. MBF er óheft partapolitiskt og átrúnaðarliga og hevur MBF til endamáls at bøta um støðuna og livikorini í samfelagnum, hjá teimum, ið bera brek. MBF arbeiðir fyri líkarætti og hevur í hesum høpi í ár varpað ljós á atkomuleika til almennar bygningar. Sum lesararnir munnu gita, so er støðan syndarlig.

MBF hevur leingi gjørt vart við, at grundarlagið undir øllum handikapparbeiði og treytin fyri einum góðum samfelag er, at øll menniskju hava sama virði. Eitt samfelag hevur ábyrgd av øllum borgarum. Myndugleikarnir hava økisábyrgd (sektoransvarlighed), har mál verða viðgjørd á røttum stað. Mannagongdin eigur at verða tann, tá tað snýr seg um mál hjá teimum, ið bera brek. Fólk, ið bera brek, ynskja ikki frammíhjárættindi, men somu møguleikar sum øll onnur. Saman við limafeløgum sínum, og øðrum felagsskapum, arbeiðir MBF fyri at vísa á og loysa samfelagsligu trupulleikarnar hjá brekaðum. MBF krevur líkarætt uttan mun til førleika. Vit krevja, at fólk, ið bera brek, ella avvarðandi teirra, eru við í øllum avgerðum, sum viðvíkja teimum. Hetta eru so sjálvsøgd krøv í einum nútímans fólkaræði, at tað átti næstan ikki at verið neyðugt at sett tey fram.

Samanhald og solidaritetur eru sjálvsøgd virði hjá meginfelag sum MBF. Víst verður á, at øll menniskju hava tørv á felagsskapi, Tí skal samfelagið vera lagað soleiðis, at øll hava møguleika at taka lut í tí, sum fer fram í samfelagnum. Solidaritetur er áhugin fyri tí einstaka borgaranum og viljin at arbeiða fyri rættvísi og líkarætti. Við at bøta um samfelagið eru vit við til at bøta um umstøðurnar hjá tí einstaka. Eisini spurningurin um fólkaræði hevur av góðum grundum felagsins stóra áhuga. Felagið sigur, at í demokratiskum samfelag eiga øll menniskju at hava møguleika at fremja sínar hugsjónir og síni sjónarmið. Har fólk, ið bera brek, ikki hava møguleikan at gera seg galdandi eins og onnur, er fólkaræðið ikki til staðar. Fólk, ið bera brek, krevja, at samfelagið verður ment soleiðis, at øll kunnu taka lut. Tað er ein sjálvfylgja, at fólk, ið bera brek, eru við í menningini av samfelagnum. MBF hevur megnað at flyta samfelagið ein góðan tein tann rætta vegin. Men enn er drúgvt á mál, og vit ynskja tí felgnum, leiðsluni og øllum limafeløgunum góða eydna við teirra týdningarmikla virksemi.

**Sosialurin**

# Margháttlig búskapargreining í Dimmalætting

**EIRIKUR LINDENSKOV**
nevndarformaður í P/F Miðlafelagnum



**Dimmalætting hevði í gjár eina greining av fíggjarstøðuni hjá kappingarneytanum, Sosialinum. Av tí at henda »greining« var so burtur úr vón og viti, hesar viðmerkingar:**

Tað er sera áhugaverdur lesnaður, tá fjølmiðlarnir viðgera vinnuvirki, greina roknskapir og greiða vanliga lesaranum frá, hvussu fíggjarstøðan hjá ávísum vinnuvirkjum er, tí roknskapir eru fyri flestu fólk sera torskildur lesnaður.

Á Dimmu er blaðmaður, sum eftir øllum at døma serliga hevur lagt seg eftir hesum, og í gjár tók hann Sosialin undir luppin.

Men tað er synd at siga, at lesarin gjørdist klókari upp á fíggjarstøðuna hjá Sosialinum – tí tú skalt gera tær stóran ómak fyri at grugga viðurskiftini meira, enn tað sum Dimmalætting í hesum føri leggur teigapláss til.

Blaðið kemur (eins og útvarpið um vikuskiftið) sum ketta upp úr høvdatrog og staðfestir, at Javnaðarflokkurin fekk 10 mió kr fyri feløgini, sum eru knýtt at Sosialinum. Hetta var frammi longu tíðliga í summar, tá málið varð lagt fyri Landsstýrismálanevnd Løgtingsins.



Sosialurin kostaði 10 mill

*Í grein í Dimmalætting í gjár viðger blaðið fíggjarstøðuna hjá kappingarneytanum, Sosialinum. Búskaparliga greiningin hjá blaðnum er kortini so burtur úr vón og viti - og fleiri milliónir krónur við síðuna av veruligu støðuni*

Í greinini filosoferar blaðmaðurin um, hvussu vit sum leiða Sosialin megna at gjalda ta skuld aftur, sum vit hava sett okkum í til tess at keypa blaðið. Hann hevur funnið fram til, at blaðið hevur eina eginogn upp á 1,9 mió kr. Síðani filosoferar hann víðari um, hvussu feløgini vórðu skrúvað saman fyrst í nítiárunum, tá rakstur og bygningur vórðu koyrd í hvør sítt felag. Hann hevur eisini roknað uppá, hvussu stórt yvirskotið hevur verið seinastu fýra árini fyri síðani at staðfesta, at nýggju eigararnir hava rindað fimmfalt fyri tað, sum fyritøkan er verd!

Her er tað, at tað haltar við journalistiska rannsóknararbeiðinum. Tí hóast tað kundi verið ein ynskidreymur, at tað stóð so illa til hjá Sosialinum, so er hetta kortini so langt frá veruleikanum.

Tí sum tað er sagt so ofta, so er talan um tvey feløg og tveir roknskapir. P/F Miðlafelagið og Føroya Tele keyptu Sp/f Sosialin og Sp/f Húsið frá Føroya Javnaðarflokki fyri 10 mió kr. Miðlafelagið, sum 14 starvsfólk og leiðsla á Sosialinum eiga, eigur 66%, meðan Føroya Tele eigur 34% av báðum feløgunum. Samlaði eginpeningurin er ikki 1,9 mió kr, men 5,6 mió kr.

Tað er ein himmalvíður munur á at keypa eina fyritøku fyri fimmfalt virði og so fyri knapt tvífalt virði.

Eitt er tað, at ein miðil í hesum føri ber ósannar upplýsingar um fíggjarstøðuna hjá kappingarneytanum – vit skulu nokk klára at svara aftur, men Dimmalætting kann koma øðrum vinnuvirkjum og vinnulívsfólki sera illa fyri, tá so ógreiðar og ófullfíggjaðar analýsur verða gjørdar – tá var tað betur ógjørt.

| **Høvuðstøl (tkr.)** | |
|---|---|
| **Sp/f Sosialurin** | **2005** |
| Urslit | 542 |
| Eginpeningur | 1.914 |
| **Sp/f Húsið** | |
| Urslit | 630 |
| Eginpeningur | 3.873 |
| **Samanlagt** | |
| Úrslit | 1.172 |
| Eginpeningur | 5.787 |
| **Ognarviðurskifti** | |
| P/F Miðlafelagið *) | 66% |
| P/F Telefonverkið (Føroya Tele) | 34% |

*) Leiðsla og starvsfólk á Sosialinum

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.